## Løgmaður vitjaði starvssystir



Í sambandi við, at løgmaður var á oyggjaleikunum á Álandi í seinastu viku, hevði starvssystir hansara Viveka Eriksson bjóðað honum til fundar. Løgmaður fekk eisini høvi at síggja nýggja mentanar- og ráðstevnuhúsið Alandica, umframt at vitja serlig mentanarstøð. Á fundinum tóku eisini fleiri álendskir landsstýrislimir lut. Áland kunnaði millm annað um álendsku stýrisskipanina og teirra sjálvstýri, eins og Áland greiddi frá royndum teirra við ES-limaskapinum, serliga teimum álendsku fyrivarnunum, og týdninginum av álendsku skipagongdini og ferðavinnuni. Partarnir umrøddu eisini arbeiðið á umhvørvisøkinum, norðurlendska samstarvið og tað at skipa fyri Oyggjaleikum. Álendingarnir vóru ógvuliga áhugaðir í føroyskum viðurskiftum, serliga var tað okkara skatta- og ríkisviðurskiftir og Føroya Altjóða Skipaskráseting, sum høvdu teirra áhuga. Seinni var tíðindafundur. Álendsku fjølmiðlarnir vóru áhugaðir í fundinum millum báðar stjórnarleiðararnar. Løgmaður og lantrådet vóru samd um, at hóast Føroyar og Áland eru ymisk, so eru nógv øki, har partarnir kunnu læra og fáa íblástur frá hvørjum øðrum. Eisini høvdu álendsku fjølmiðlarnir serligan áhuga í at hoyra nærri um føroysku undirsjóvartunnlarnar, tí Áland skal taka støðu til teirra fyrsta undirsjóvartunnil.

# Lívsstílsstevnan í nýggjum hami



*Annika Andreasen og Ása Andreasen, stovnarar og eigarar av Synergi*

*Mynd: Savnsmynd*

**Synergi hevur fingið íblástur úr útlandinum og bjóðar til eina øðrvísi og nýggja Lívsstílsstevnu á Hotel Føroyum í døgunum 17. og 18. oktober**

LÍVSSTÍLUR

*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Mótasýningar. Brakandi shows. Viðkomandi fyrilestrar. Áhugaverd sofaprát. Snøgt sagt ein lekkur coctail, sum smakkar bæði teimum villu og teimum meira stillu.

Soleiðis vil Synergi lýsa ársins útgávu av Lívsstílsstevnuni, sum føroyingar sleppa at uppliva fyri triðju ferð í Føroyum. Men hesaferð verður tað í nýggjum hami, at Synergi bjóðar føroyingar til kunning um lívsstíl og vælveru.

### Nýggj høli

Tað verður Hotel Føroyar, sum verður karmur um Lívsstílsstevnuna í døgunum 17. og 18. oktober í ár. Tá lata dyrnar upp til eina nýggja og øðrvísi stevnu enn undanfarin ár.

- Vit hava nýtt høllina á Hálsi til tiltakið seinastu tvey árini, men fara nú at royna hølini á Hotel Føroyum. Tey eru betur egnaði.

Hvussu verður stevnan øðrvísi hesaferð?

- Vit hava fingið íblástur úr útlandinum, serliga úr Danmark. Har verða ymisk slott ofta nýtt til líknandi stevnur, og vit ætla at skapa ein slotsstemning á Hotel Føroyum. Tað verður størsta broytingin, siga tey úr Synergi, sum stendur fyri stevnuni.

Hóast stevnan undanfarin ár eisini hevur verið ætlað mannfólki, hava fyrireikararnir lagt størri dent á at fáa menninir við hesa ferð.

- Undirtøkan hevur verið frálík seinastu tvey árini, og nú vóna vit, at úrslitið verður enn betri. Millum annað orsakað av, at vit eisini hava fleiri áhugamál hjá mannfólki, siga tey úr Synergi.



*Júnikk heldur nú til í konditt arínnum*

*Mynd: Uni Holm Johannesen*

# Klæðir á konditt arínum

**Í farnu viku lat Júnikk upp í nýggjum hølum**

Í hølunum, har havnarfólk áður sótu og loystu alkyns trupulleikar við einum koppi av kaffi, er nú ein nýggjur klædnahandil.

Mikudagin í farnu viku lat Júniik upp á Konditt arínum í Havn. Handilin hevur seinastu tíðina búleikast í SMS.

Brynhild Restorff er nýggjur eigari. Hon hevur keypt Júnikk frá Petrinu Berg, sum framvegis starvast í handlinum.

- Vit valdu at flyta handilin, tí Konditt aríið er best egnaða hølið í høvuðsstaðnum. Fólk hava latið sera væl at higartil, sigur Brynhild Restorff, eigari.

*- uni*

# StatoilHydro seismikk við Føroyar fyri 50 mill. Kr.

**Norski oljurisin og eisini størsta vinnufyritøkan í Norðurlondum, StatoilHydro er saman við Dong, Atlants Kolvetni og Føroya Kolvetni í gongd við at skjóta seismikk á landgrunninum fyri hálvthundrað milliónir krónur. Harrier Explorer var á Havnini í gjár.**

SEISMIKKUR

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Seismikkskipið Harrier Explorer, sum arbeiðir fyri StatoilHydro á føroyskum øki, kom inn á Havnina týsmorgunin. Skipið skifti manning. Tað eru 46 mans við skipinum. Fyri manningina, sum skal umborð, varð eitt sokallað trygdarskeið hildið á Hotel Hafnia sama dag.

Umframt manningarskiftið, skal skipið bunkra og gera okkurt annað smávegis arbeiði. Tað er Atlantsflog, sum hevur kontrakt fyri manningarskiftið. Uppruna ætlanin var at gera hetta úti á feltinum við tyrlu, men av tí veðrið ikki var til vildar, kom skipið inn á Havnina. Tað er Thor í Hósvík, sum er agentur fyri skipið.

Av StatoilHydro skrivstovuni í Føroyum verður upplýst, at kostnaðurin fyri seismikkarbeiðið er umleið 50 milliónir krónur. Umframt StatoilHydro, sum er fyristøðufelag, eru eisini DONG, Atlants Kolvetni og Føroya Kolvetni við í samtakinum, sum ger arbeiðið. Henda ein tann mest umfatandi seismiska kanningin á føroyska landgrunninum skal vera við til at rudda slóð fyri eini ella møguliga fleiri komandi boringum í loyvum, har StatoilHydro er fyristøðufelag. Endamálið við kanningini er m.a. at finna fram til, hvar besta staðið er at seta borin í. Herfyri segði ovasti altjóða stjórin fyri leiting hjá Statoil Hydro, Tim Dodson við Sosialin eftir fund í London við Johan Dahl, oljumálaráðharra, at StatoilHydro metir Føroyar sum eitt áhugavert leitiøki og fer felagið í minsta lagi at bora ein brunn her komandi árini.



*Harrier Explorer bunkrar og skiftir manning á Havnini týsdagin.*

*Mynd Álvur Haraldsen*